# Beinta & Ingi

Hjúnini Beinta og Ingi fara at borðreiða við einari einklari og inniligari framførslu á Fjarðafestivalinum. Beinta syngur, meðan Ingi spælir gittara og syngur røddir.

- Vit fara at syngja ymiskar kendar sangir sum t.d. 'How Great Is Our God' og 'Shackles' hjá MaryMary, sigur Beinta, ið ikki smæðist við at greiða frá hví hon syngur:

- Eg elski at syngja og eg havi eina sterka trúgv á Gud, og tí er tað sera natúrligt at sameina hesi bæði; kærleikan til sang og kærleikan til Gud.

Seinastu trý árini hava tey bæði framført nógv í kristnum høpi:

- Vit hava spælt til HMU-konsertirnar, til gospelkonsertir og í samkomum kring landið. Samstundis eru vit ein partur av lovsongstoyminum í Kelduni. Men eg haldi, man kann siga, at hetta er okkara størsta uppgáva higartil.

Tónleikur er ein stórur partur av hjúnabandinum hjá teimum báðum:

- Vit bæði syngja nógv og hava nógv við tónleik at gera í gerandisdegnum, og tað fyllir nógv í okkara heimi. Ella beint nú flyta vit, so har hendir ikki nógv í løtuni, sigur Beinta og leggur aftrat, at í bilinum er altíð nógvur tónleikur, og har verður sungið væl við. Serliga í hesum flytingardøgum.

**Petur Háberg**



# VOX



Framførslan hjá gospelkórinum VOX í fjør fekk sera góð ummæli, so tað skuldi ikki komið óvæntað á nakran, at tey aftur eru á skránni í ár.

VOX hevur verið til í skjótt tíggju ár, og uttan at taka munnin ov fullan, so eru tey fremsta gospelkórið í Føroyum í løtuni.

Manningin kemur øll úr Heimamissiónini, og síðani tey byrjaðu í 1998, hava tey sungið til møtir, konsertir, festivalar og onnur tiltøk.

Kórið, ið hevur staðið á palli við stórum nøvnum sum Etta Cameron og Jesse Dixon, fer at framføra lívlig løg hjá m.ø. Kirk Franklin og Fred Hammond, men eisini meiri friðarlig løg sníkja seg inn á spælilistan.

**Petur Háberg**




Klárir til tygara tænastu

KJ HYDRAULIK er ein fjølbroytt fyritøka, sum veitir útgerð, eykalutir og tænastur til skipaflotan, flutningsvinnuna, entreprenørvinnuna og alivinnuna.



KREA.FO · TEL 47 80 80

KJ veitir:

- hydrauliskar umvælingar og ísetanir
- skipa- og maskinumvælingar
- kranakanningar á sjógvi og landi

PALFINGER · JCB · RAPP HYDEMA · PALFINGER MARINE · HYUNDAI HEAVY INDUSTRIES CO.,LTD. · DNV ISO 9001:2000

Vit hava á goymslu:

Hydraulikk pumpur, hydraulikk motorar, hydraulikk ventilar, hydraulikk slangur-, rør- og fittings, hydraulikk filtur, smyrjioljufiltur, brennioljufiltur, leigir, koblingar og koblingshúsar, magnetkoblingar, tetningsringar, stempul, stempulstengur.

Vit hava sølu- og tænastuumboð fyri:

Rapp Hydema, Palfinger, JCB, Triplex, Karmøy, Rotzler, Pullmaster, Parker-Denison, Sauer-Danfoss, Bosch-Rexroth, Eaton-Vickers, Vibromax, Hyundai, Caterpillar, ABC Motors , Iveco Motors.

Kambsdalur · Tórshavn

KJ HYDRAULIK POWER & MOTION CONTROL

Tel 40 70 00 · Faks 40 70 01 · info@kj.fo · www.kj.fo

Vit ynskja øllum ein góðan Fjarðafestival



ALFA TRANSPORT

TEL 50 51 91 VØRUKOYRING